

www.oljan.fo

**Jan Müller** 03 - 11 - 2011

# Frægari hjá Det Norske Oljeselskap

Det norske oljeselskap hevði 155 milliónir norskar krónur í halli fyri skatt í triðja ársfjórðingi, men tað er kortini eitt munandi betri úrslit enn í sama ársfjórðingi í 2010, tá hallið var 309 milliónir krónur. Raksturin gav eisini munandi betri úrslit í triðja ársfjórðingi í ár enn í 2010, hóast talið framvegis er á teirri skeivu síðuni. Í triðja ársfjórðingi í ár gav raksturin 119 milliónir norskar krónur í halli, men tað skal samanberast við 253 milliónir í halli í sama tíðarskeiði í 2010. Rakstrarinntøkurnar í triðja ársfjórðingi í ár vóru 82 milliónir norskar krónur, ið er at kalla tað sama sum í somu mánaðum í fjør. Felagið hevur gjørt stórar íløgur í leiting seinastu árini, nakað, sum nú fer at fáa fyritøkuna á rætta kós. Erik Haugane, stjóri í Det norske oljeselskap, dylur ikki fyri, at hýrurin er góður eftir tað stóra Aldous Major-fundið, sum felagið eigur 20 prosent av. Í nøgd svarar parturin hjá felagnum til millum 180 og 300 milliónir tunnur. Fíggjarstjóri í felagnum er Teitur Poulsen úr Havn. Mynd - Teitur Poulsen, fíggjarstjóri hjá Det Norske Olieselskab. Myndatøka oljan.fo/Jan Müller